Fyribrygdið Ó. B.

Onkuntíð fyrst í sjeytiárunum kom ein nýklaktur Master of Arts heim aftur úr Onglandi. Inntil tá hevði hann tykst at veri bæði smæðin og lítillátin, men nú við hesum akademiska reyðfiskaprógvi í reyvalummanum, fekk pípan annað ljóð. Føroysk blaðskriving og føroyskur politikkur hevur ikki verið hin sami, eftir at hesin stavnur greip penning og fekk málið fyri seg.

Tað er neyvan nakar, ið kann siga við vissu, um tankin at gerast Føroya svar upp á Mc'Carty kom sum eitt skot ella búnaðist so líðandi, tí burtursæð frá einum grovum persónlimum álopi á Karsten Hoydal, hoyrdu vit ikki so nógv politttiskt frá honum fyrstu tíðina. Tá fekst hann mest við at vera plátuvendari í útvarpinum og at spæla manequin í Havnargøtum — tíverri kom sjónvarpið ov seint, annars kundi hann upptráðka har, áðrenn hann fekk bilbúkin og hevði mist meginpartin av hárinum. Men seinni bar betri til.

Men fyribrygdið Óli B. eru vit noydd at taka í álvara, hóast hansara klóvnalótir: Láturlig krúpan fyri kapitalinum her á landi, heimføðisligar royndir at billa føroyingum inn, at javnaðarmenn eru kommunistar, ekstatiska dyrkan hansara av politiskum faðirmyndum, sum Reagan, Pinochet og Frantz Josef Strauss, tí so løgið tað enn ljóðar, hevu. fólkaflokkurin lítið honum blað sítt upp í hendur, og hevur sostatt gjørt hann til stavnamann flokksins, og givið grønt ljós til ta andstyggiligu persónsjagstran, sum Dagblaðið er á tremur av nærum hvørja ferð, tað kemur út. Ja, so er hann eisini fólkavaldur, so ráheit og ófólkaligheit kann eisini gerast ein billett til tingarbeiðið.

Viðvíkjandi seinastu skemdargreinini, har friðargongan fær sítt (Dagblaðið 13/5-1983): Tað ber til at fáa dóm upp á, at ein ikki er fascistur. Tað átti at borið til at fingið dóm upp á, at ein ikki er KGB-agentur. Vælsignaði tit 250, ið luttóku í friðargonguni, gevið skálkinum møguleika at dokumentera í rættinum fantastiska pástandin, at tit skulu vera landssvíkjarar og agentar fyri ein útlendskan felagsskap, bert tí tit ynskja øll atomvápn eystanfyri og vestanfyri burturbeind.

scorpio


Gjøgnum bakdyr álíknar samgongan eykaskatt



sjónarmið

Ídag

Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður



SKATTAKORT 1983/84

FØROYA GJALDSTOVA

SKATTAUTROKNING

[redacted]

KJAMUDSKATTUR	17,94	KR.	25.392	KR. 25.392
KI-KJUDSKATTUR	0,254	KR.	362	KR. 362
LAVDSSKATTUR		KR.	45.235	
- PERSONSFRADRATTUR	3.549 KR.		3.549	KR. 41.686
ALMANADUR SKATTUR TALT				KR. 67.440

HVORT GJALDIÐ : 1. - 7. GJALD KR. 7.233
2. - 7. GJALD KR. 7.225
8. GJALD KR. 5.620
9. - 10. GJALD KR. 5.620

Tann søguliga skattarokningin

Í flestu kommunum hava fólk nú fingið skattarokningina og øll eru varug við, at tey sjey gjøldini, sum falla til gjaldingar í hesum almanakkaárinum, eru munandi hægri enn tey trý gjøldini, ið møguliga falla til gjaldingar í komandi almanakkaári.

Tá eg sigi tey trý gjøldini, ið møguliga falla til gjaldinga í komandi almanakkaári, so kemst hetta av, at hesi trý gjøldini falla burtur, um so verður, at samtíðarskattaskipanin kemur í gildi 1. januar 1984, soleiðis sum ætlanin hjá landsstýrinum og samgonguni er.

Á tingi hevur drúgt og hart orðaskifti verið ímillum samgonguna og andstøðuna um hendan spurning. Vit í javnaðarflokkinum halda fast við, at landsstýrið á hendan hátt tekur 5 pst. ella eitt hálvt gjald eyka frá hvørjum skattgjaldara, meðan samgongan heldur uppá, at mannagongdin við skattainnkrevjingini í hesum skattaárinum er bein.

Eg fari her at taka eitt dømi sum sýnir hvat tað veruliga er sum hendir. Fyri at nýta eitt runt tal kunnu vit taka ein skattgjaldara hvørs álíkning er 50.000 kr. í hesum skattaárinum. Av hesum skal hann gjalda 37.500 kr. í 1983. Tað gevur sjey gjøld uppá 5.357 kr. Kemur samtíðarskattaskipanin ikki í gildi 1. januar 1984 skal hann í fyrsta ársfjórðingi 1984 gjalda trý gjøld á 4.166 kr.

Við øðrum orðum vil hetta siga, at kemur samtíðarskattaskipanin ikki í gildi 1. januar sum ætlað, so verður hvørt gjaldið hjá hesum skattgjaldaranum frá 1. januar 1984 lækkað úr 5.357 kr. niður í 4.166 kr. ella lækkað við 1.191 kr. um mánaðin. Fyri allar tríggjar mánaðarnar gevur hetta 3.573 kr.

Men ganga vit nú út frá, at samtíðarskatturin kemur í gildi 1. januar 1984 hendir tað at viðkomandi skattgjaldari ikki fær hesa lækking. Hann skal tá gjalda skatt av inntøkuni beinan vegin. Hann kemur valla at gjalda minni enn hann hevur goldið í tíðarskeiðnum frá mai til november 1983. Helst tað sama ella meir.

Talan er sostatt um, at samgongan um bakdyrnar, hevur álagt fólki ein eykaskatt, sum svarar til 5 pst. av álíknaða skattinum í 1983/84.

Vilhelm Johannesen

Nú bakkar løgmaður

politisk viðmerking

Í Dimmalætting roynir løgmaður Pauli Ellefsen at bera í bøtuflaka fyri úttalilsi síni í mai-røðu síni.

Har sigur hann, at lønarkrav arbeiðaranna vilja verða kravd inn aftur við inntøkulógum til heystar.

Hesaferð kann løgmaður ikki skjóta seg undir, at »hatta havi eg ikki sagt« tí nú stendur røða hansara uppá prent.

Tey, sum minnast víðagitnu **»lagkøkurøðu« Paula Ellefsen's, ella hava hana á prenti, og so nú samanmeta, leggja beinanvegin til merkis, at hetta er hvør sín maður sum talar, og tó í báðum røðunum er nakað, sum vísir rætta lyndið Paula Ellefsen's.**

Hetta at taka uppgávur sínar nakað lætt, og eins og hann gjørdi tað sum andstøðuleiðari, ger hann tað sama ídag.

Tað gongur ígjøgnum alt, sum hesin maður ger; nakað sum vísir, at hann hevur lítla virðing fyri samstarvsmonnum sínum, bæði í samgongu og ikki minni í andstøðu.

Hesin maður, sum hevði loysningar upp á allar spurningar og fjøldin sum lurtaði eftir honum, uttan mun til hvat hann sigur, at uttan at geva sær far um, hvat tað er, hann boðar frá, men her mistekur løgmaður seg. Fjøldin lurtaði, men tað ger hon ikki meira.

Men nú sami maður situr við ábyrgd, verður betri lagt til merkis, hvat sagt og skrivað verður av leiðara landsstýrisins — hann, við patentinum upp á allar loysningar, hevur ikki loyst nakað.

Hann skuldi heldur vanda sær um orðini fyri ikki at siga gerðirnar.

Men tað ger hann ikki.

Tá tað var at loysa málið viðvíkjandi Hjaltnakletti ella at flyta Sjúðraklett til valgdømi sítt, tá var alt í lagi.

Men at ganga arbeiðarafjøldini á møti, tá ber ikki til.

Grein 13 er ikki fyri arbeiðarafjøldina.

Í fyrru mai-røðu síni vísir andstøðuleiðarin Pauli Ellefsen á skeivleikarnar í samfelagsbýtinum, og hann hevði so sanniliga rætt, men hvat ger sami maður, tá ið hann fær makt.

Við grein 13 í rygginum kundi hann betra og rætta skeivleikarnar. Veruliga lyndi kemur fram í seinri røðu Paula Ellefsen's, nú hann sum løgmaður gloymir tað, hann segði í fyrru røðu síni, men ístaðin fyri háttir ta **føroysku arbeiðarafjøld.**

— Tað, sum tit við lønarsamráðingar fáa, taka vit inn aftur við inntøkulógum til heystar.

Og so skoytir hann upp í tað vanliga, at hinir hava skyldina, tí hann vísur til uttanlandsskuldina.

Hetta er ov vánaligt, harra løgmaður, hetta heldur ikki, sjálvt Dagblaðið hevur í oddagrein hesar viðmerkingar.

Eitt er at snakka Føroya fólki upp í rulk, tá ein er leiðari av politisku andstøðuni á ting.

Annað er at hótta allar samráðingar upp í ein ellubita hjá einum sum er leiðari av ráðandi samgongu á tingi og fyri landastýrið, og heldur Dagblaðið fram:

At Føroya løgmaður sjálvt 1. mai hóttir báðar partar á arbeiðsmarknaðinum uttan mun til avleiðing og úrslit á samráðingunum við at siga, at hitt almenna stjelur aftur tað sum vunnið verður.

Hetta er ein álvarsligur brølari, og um úrslitið av brølara løgmann's er bert at gita.

Tað kann vera ábyrgdarloysi løgmann's, men endar Dagblaðið, vónandi er tað roksulyndi og tvørrandi fatan, hvat í krevst av einum leiðara av samgonguni.

Hetta var einki gott skoðsmál av samgongumonnum.

Veruleikin, harra løgmaður, tygum nýtast ikki at hótta at taka aftur tað, sum møguliga vunnið verður, tí tað hava tygum longu tikið við inntøkulóg sum landsstýrið tygara framdi, tá tit tóku yvir 50 milliónir í eykatolli.

Sambært Jógvan Sundstein var tað ikki grundarlag fyri tí, og tað kom eisini seinri fram.

Tað skuldi verða ein eingangslóg

Hví ikki taka hana av nú.

Tygum og landsstýrið tygara hava lagt stein oman á byrðu.

Um arbeiðarafjøldin gjørdi rætt, skuldi hon fyri uttan rættvísislønarkrøv síni, kravt eina regulering í vanliga forbrúksprísinum, ein niðurskurður uppá 20 til 25% hevði verið rímuligur.

Hvar er prissteðgurin, hvar er priseftirlitið, og ikki at gloyma, hvat kontroll er við, hvørjar vørur verða seldar.

Sjálvstýrisflokkurin segði seg vilja gera nakað við hetta, men kanska er tað her sum við øðrum, har Hilmar Kass sigur, vit megna tað ikki.

Hvat við grein 13.

Føroya Fólk hava sannað, at henda samgonga og leiðari tess einki hevur at bjóða, og við grein 13 hava teir máað støðið undan øllum demokratiskum rættindum í Føroyum.

Í september 1981 skrivar Ivan Johannesen figgjarnevndarformaður soleiðis:

— Eg taki fult undir við løgmanni. **»Sannleikin kann ikki dyljast«**, og rætt hevur hann harra løgmaður, sannleikin kann ikki dyljast. Og hetta hevur ikki bara tann føroyska arbeiðarafjøld sannað.

Nei Føroya fólk hevur sannað, at einasta alternativ verandi løgmaður og samgonga hevur, er ein ódemokratisk grein 13.

Og ídag hóttir hon tað føroysku arbeiðarafjøld.

Sverre Midjord